VIÐMERKINGAR

Til minnis um
Karl Vang

Ta› er altí› ringt at seta seg ni›ur at skriva minningaror›, og so serliga tá ta› er ein, sum man er komin at halda nógv av.

Karl var ein ma›ur, i› ikki seg›i so nógv í or›um, men álíkavæl vistu tú altí› hansara meining. ta› var ótrúliga lætt at blíva gó›ur vi› hann, tí hann hev›i sín serliga máta at vera uppá.

Um man kom inn til Annu og Karl ein sunnudag kl. 17.00 kundi man vera vísur í at møta honum vi› urinum í hondini, púra klárur at fara á møti kl. 18.00.

Men so bleiv Karl sjúkur, bleiv veikari og veikari, ta› var ótrúliga ringt at síggja, hvussu hann vikna›. Men eitt er víst, í dag hevur hann ta› gott, burtur úr likaminum heima hjá Harranum, sum ta› bleiv sagt bæ›i í kapellinum og til jar›arfer›ina, og eg veit at vit ein dag skulu síggjast aftur heima hjá Harranum, saman vi› øllum okkara kæru, vit sum hava tiki› ímóti Honum sum okkara persónliga frelsara.

Eg havi altí› følt meg væl at koma inn í heimi› hjá Annu og Karl í Kaldbak, altí› veri› væl móttikin og altí› hava tey veri› klár at bjó›a okkurt gott, og somulei›is er ta› eisini nú tú Anna situr einsamøll eftir.

Eg ynski vi› hesum fáu or›um at takka fyri ta›, sum tit hava veri›, og tú Anna ert fyri meg, Karl, Tordis og Mariannu. Má Harrin styrkja tykkum øll og teg Annu á ein serligan hátt.

Æra veri minni› um Karl.

Takk fyri alt.

Heidi v/ fam.

Hvussu langt kemst?

Regin av Steinum,
valevni á tjó›veldislistanum til b‡rá›i›



Tórshavnar kommuna hevur eina rúgvu av málum, sum bí›a eftir at vera gjørd li›ug. Øll kosta tey nógvan pening, og fleiri teirra ver›a tí ikki gjørd li›ug eftir einum ári.

Her kunnu nevnast:

- ansingarmáli›, runt í allari kommununi
- munandi útstykkingar
- skúlabyggingar, t.d. á Argjum og í Hoyvíkshaganum
- 2 ítróttahallir, í Kollafir›i og Hoyvík
- ringvegurin
- ídna›arøki
- ymisk vinnufremjandi og -lættandi tiltøk
- bryggju- og havnarvi›urskifti, t.d. í Kollafir›i
- bátahyljar at gera lidnar, t.d. á Argjum og Signabø
- smærri og størri vegaábøtur ymsasta›ni í kommununi
- umstø›ur til frælsan ítrótt í Havn

Listin er ivaleyst longri, men vit skulu minnast til, at øll hesi málini skulu setast upp ímóti einum ávísum skattaprocenti (18,5%?), sum gevur so og so nógvar milliónir í kommunukassan. Hvussu stórt rúm ver›ur nú til onnur mál? Ta› er sjálvandi eisini ein áhugaverdur spurningur.

Høvu›ssjónarmi› mítt er, at nevndu málini skulu fremjast í komandi valskei›i innan fyri vanligar fíggjarkarmar.

Hjartamál fyri Havnina

Jógvan Arge
valevni tjó›veldisfloksins til Tórshavnar B‡rá›

Á alnótini spurdi ein brúkari meg, hvat hjartamál eg havi fyri Havnina. Eg má vi›ganga, at eg í knappari vend hev›i ilt vi› at taka eitt mál fram um onnur. Svari› bleiv tí ta› einfalda, at eg havi bara hjartamál fyri Havnina.

Havnin er ein gó›ur b‡ur at búgva í. Havnin er okkara kulla. Her tími eg at vera. Eg stórtrívist millum fólkini og húsini í Havn, og eg veit, at ta› eri eg ikki einsamallur um.

Vit eru mong, sum hava ta› felags mál, at Havnin skal vera ein gó›ur, vinarligur, vakur, reinur og virksamur b‡ur at búgva í og koma til. Her skal vera lív og gró›ur og menning. Men hetta kemur ikki bara av sær sjálvum.

Fyri framman eru stórar og spennandi avbjó›ingar, sum seta krøv til borgararnar og tey, sum stíla fyri í Tórshavnar Kommunu. Vit mugu leggja okkum eftir, at b‡urin fylgir vi› menningini á øllum økjum, og at kommunan er før fyri at útinna sín t‡¤andi leiklut í landinum og Atlantshavinum.

Onganti› er meiri aktuelt enn nú at gera sær hugsanir og leggja ætlanir um framtí›ina hjá okkara høvu›sta›i. Tann minkandi heimurin og tann vaksandi altjó›ageringin geva okkum møguleikar, sum vóru óhugsandi fyri bert fáum árum sí›ani.

Kollveltingin í telesambandi og fer›asambandi hava gjørt, at fjarstø›an hevur litlan t‡dning longur. Umheimurin kann nú lættliga taka okkum vi› í sínar verkætlanir, og vit kunna fara upp í verkætlanir saman vi› umheiminum á mestsum jøvnum føti.

Fruktirnar av øllum hesum n‡tí›ar møguleikum skula sum frálí›ur síggjast aftur í Havn, og ta› skal eisini síggjast aftur í Havnini, at útlit eru fyri olju undir Føroyum. Hesar avbjó›ingar mugu takast vi› opnum sinni og stórum álvara og setast inn í karmar, sum hóska saman vi› okkara fyritreytum og mentan.

Nøkur av mínum hjartamálum fyri Havnina eru sostatt, at Havnin alsamt ver›ur ein gó›ur b‡ur og høvu›sta›ur at búgva og virka í, at Tórshavnar Kommuna altí› at skarar fram úr á Føroyakortinum, og at Havnin og Tórshavnar Kommuna til eina og hvørja tí› eru før fyri at útinna leiklutin sum mi›stø›ir í Nor›uratlantshavi.

Vi›merkingar til Hans Jákup Simonsen, Kollafjør›ur

Schumann Hjaltalin,
b‡rá›slimur, valevni fyri Sambandsflokkin

Hans Jákup Simonsen sigur í grein í blø›num tann 1. november, at hann hevur siti› í sosialu nevnd sum umbo› fyri Kollafjar›ar kommunu og fylgt tí politiska or›askiftinum um barnaansingina og hevur harvi› fingi› stóran áhuga fyri barnaansingarøkinum.

Hvussu Hans Jákup hevur fylgt vi› í tí politiska or›askiftinum, kann eg ikki gera vi›merkingar til, men tá hann sigur, at b‡rá›i›, undantiknir javna›arpolitikarnir, koyrdu máli› um barnaansing í nevnd fyri at súlta máli›, so er hettar ikki rætt. Ta› var einmælt samtykt at koyra máli› í nevnd, eisini Javna›arflokkurin tók undir hesum.

Nú veit eg ikki, um Hans Jákup hevur fylgt ov illa vi›, men rætt skal ver›a rætt.

Annars hevur B‡rá›i› samtykt vi› fyrstu vi›ger av fíggjarætlanini at seta pening av til barnaansingarøki›, somulei›is at ansingin ver›ur loyst til ár 2003, á hesum fundi luttók eisini Hans Jákup Simonsen.

Kvinnur í politikk?

Maria á Dul
valevni Fólkafloksins til Tórshavnar b‡rá›

Nú, uppundir komandi b‡rá›sval hevur serliga nógv veri› tosa› um, at kvinnur skulu ver›a meira virknar í politikki, og fleiri kvinnur eru eisini uppstilla›ar hesafer›.

Nú er so upp til veljaran at gera naka› vi› ta›!

Men hví skulu kvinnur vera virknar í politikki?

Jú! Um tú skalt fáa nóg breitt grundarlag at taka avger›ir út frá er ney›ugt at fáa l‡st stø›urnar frá øllum sjónarhornum. Ta› fæst ikki bara vi› monnum.

Javnvág má inn í avger›argrundarlagi› – avger›irnar!

Ta› er væl kent, at har menn hugsa í eindum, hugsa kvinnur í heildum, menn hugsa meira um tey »hør›u« tingini, havnir o. s. v., kvinnur hugsa meira um tey »bleytu« tingini, heilsu - og sosialmál o.s.v., harvi› sjálvandi ikki sagt, at ta› eina er meira t‡dningarmiki› enn hitt, ella at bæ›i kyn ikki duga at taka avger›ir um bæ›i, men vi› eisini at velja kvinnur inn í b‡rá›i› er størri møguleiki fyri at tær avger›ir tiknar ver›a, vera til frama fyri heildina.

Gott val!

VIÐMERKINGAR

Býráðsvalið 21. november 2000

Eiler Johannesen
valevni

Uppgávan hjá býráðnum er at skapa góðar og tryggar karmar um alt fyritaksemi í býnum, tað verið seg at útvega grundøkir til bygging av sethúsum, soleiðis at fólk kunnu seta føtur undir egið borð. Karmar fyri framleiðslu og vinnurekandi, soleiðis at møguleiki eru fyri arbeiðsplássum til fólkið í kommununi, vegakervi – soleiðis at fólk trygt kunnu koma og fara til og frá arbeiði og skúla. Stovnar til barnaansing, sum kommunan nú hevur fulla ábyrgd av, og harvið betur er før fyri at tilrættaleggja íløgurnar til at nøkta ansingar tørvin. Karmar fyri tann sum eigur bát, t.v.s. bátapláss og – drátt til ymiskt viðlíkahald v.m.

Ein hin týdningarmesti karmurin er møguleikin/evni til at fíggja tann tørv, sum er í kommununi. Tí er tað av stórsta týdningi, at sum mest fæst fyri hvørja krónu, sum rindað verður í skatti. Sostatt kann vera neyðugt at raðfesta íløgurnar soleiðis, at skuldin hjá kommununi kann haldast so lág sum gjørligt, og at borgarin ikki rindar hægri skatt enn rættvíst er.

Flokkurin ynskir at vera við at ávirka politikkin og harvið tær avgerðir, sum skulu takast komandi 4 árini.

Tað er sera týdningarmikið at taka rættar avgerðir og ábyrgdina av teimum.

Innan sethúsa marknaðin vita vit, at útboðið í løtuni er lægri enn eftirspurningurin. Hetta hevur við sær, at kostnaðurin fyri sethús er sera høgur, og eigur kommunan at betra umstøður teirra ungu, sum standa fyri at ogna sær egið heim. Ein gongd leið kundi verið at útvega bíligari eldraíbúðir til tann, sum ikki longur sær seg føran fyri at halda sítt stóra sethús við líka, og soleiðis lætta trýstið eftir sethúsum.

Ásannandi at tað verða fleiri eldri og gomul í kommununi, (hetta er jú tekin um trivnað) økist tørvurin eftir umlætting og umsorgan fyri tey eldru, sum ikki longur hava sín førleika. Tórshavnar Kommuna hevur tí tørv fyri fleiri tilboðum til tílíkar borgarar, her er útbyggjan av umlættingarheims skipanini ein møguleiki.

Tað eru fleiri vegir í kommununi, sum eru sera belastaðir t.d. um morgunin, tá fólk skulu til arbeiðis, eisini tí at mong koma úr øðrum bygdum til kommununa til arbeiðis, og má ein loysn finnast upp á hesa støðuna. T.d. er tað sera vandamikið niðri við St. Frans skúla og Kommunuskúlan um morgunin; tað er sera trupult og vandamikið at sleppa frá Tróndargøtu inn í Niels Winthersgøtu um morgunin, og tá arbeiðsdagurin er liðugur. Eisini kann nevnast vegastrekkið Sundsvegur/Norðari Ringvegur; strekkið: Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur. Landavegur/Frælsið; Grønlandsvegur/ J. Paturssonargøta fyri at nevna nøkur – og mong onnur øki afturat.

Undirritaðið hevur játtað seg sum valevni fyri Sjálvstýrisflokkin fyri, um borgararnir finna meg trúverðan, at vera við til at ávirka gongdina í Tórshavnar býráð saman við hinum valevnunum í flokkinum, soleiðis at Tórshavnar Kommuna kann vera ein góð, trygg, barnavinarlig og ellisvinarlig kommuna at búgva í.

Eisini vil eg nýta høvi til at ynskja Kollafjørð vælkomna upp í Tórshavnar kommunu, við ynski um gott samstarv. Set krossin við lista D, tín trygd fyri Dygd.

Traðamaðurin má ikki fara í søguna

Heðin Mortensen
býráðslimur sambandsvalevni til Tórshavnar býráð

Uttan fyri býráðshúsini í miðbýnum í Havn stendur vakra standmyndin av traðamanninum, ið m.a. hevur verið at sæð kring allan heim í sjónvarpi gjøgnum sendingarnar frá kappingini »Atlantic Giant«.

Samstundis sum vit fegnast um hetta, eiga vit at ansa eftir, at traðamaðurin ikki fer í søguna, men eins væl kann vera ímyndin av monnum í høvuðsstaðnum, nú vit eru á veg inn í 21. øld.

Traðirnar eru millum ár og dag komnar mongum manni væl við, ið vildi stytta sær stundir og takast við aldargamalt ítriv, samstundis sum tær eru við til at halda lív í mongum gomlum siðum og siðvenjum, føroyingurin altíð hevur sett eina æru í.

Tá vit so vita, at biðirøðirnar eftir at fáa traðir eru langar, eigur Tórshavnar kommuna at taka neyðug stig, so eisini hesar bíðiraðirnar kunnu styttast.

Kommunan eigur nógva jørð, ið er vælegnað og uppløgd at verða løgd inn til traðir, so gleði kann fáast av hesi jørð, samstundis sum hon sleppur at geva nakað av sær.

Verður hetta gjørt, kunnu tilfeingi sum epli, rótakál, kjøt, fuglur og annað koma mongum húskjum í høvuðsstaðnum til góðar og vera til stóra gleði.

Og í mongum førum ber til hjá fleiri at vera saman um traðirnar, so eitt nú beiggjar ella feðgar kunnu vera um eina trøð, samstundis sum bíðiroðin tá minkar uppaftur skjótari.

Eg vil arbeiða fyri, at kommunala jørðin á henda hátt kann koma so mongum sum gjørligt til góðar, samstundis sum jørðin tá fær sítt sanna virði og lívgar gamlar siðir og kemur at verða mongum húskjum til stórt gagn.

Vit senda børn og ung av landinum tí vit ikki hava nakað at bjóða teimum her heima

Hildur Eyðunsdóttir
Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum

Sum limur í barnaverndarnevndini í Tórshavnar kommunu, havi eg fleiri ferðir av neyð verið við til at senda børn og ung av landinum. Hetta eru børn sum vegna ymiskar trupulleikar hava gott av at koma heimanífrá, skifta umhvørvi og hava brúk fyri skúlagongd sum er málrættað til teirra tørv, har lærararnir og onnur starvsfólk eisini hava til uppgávu at vera um og hava umsorgan fyri næmingunum.

Tað eru ikki bert børn og ung úr Tórshavnar kommunu sum verða send av landinum, men úr øllum Føroyum. Eg haldi ikki at tað sømir seg fyri land okkara at vit ikki sjálvi taka okkum av hesum børnum. Ofta er tað talan um børn ella ung sum eru umsorgarsvikin ella vegna aðrar umstøður eru illa fyri og hava sær í viðførinum tá ið tey fara til Danmarkar sum fyri tey er eitt fremmant land við aðrari mentan, máli og normun. Tað hendir eisini javnan at tey koma heim aftur áðrenn skeiði er hálvrunnið tí at tey ikki trívast.

Kunnu vit yvirhøvur loyva okkum moralskt at senda trupulleikarnir av landinum og høvdu teir ikki verið best loystir her heima.

Tað eru vit sum arbeiða í nærumhvørvinum hjá børnunu, sosialráðgevarar, barnaverndir, skúlar og onnur sum síggja trupulleikan best.

Hóast eftirskúlar er ein landsuppgáva so eru tað kommunurnar sum hava trupulleikarnar inni at sær, og eg haldi at kommunalpolitikkarnir, barnaverndir, komandi skúlastýrini o.o. eiga at samstarva tvørtur um kommunumark og mæla landsmyndugleikunum til bestu loysnirnar.

Í dag gjalda vit tað tað kostar at senda børnini av landinum, hví ikki heldur brúka peningin til eina føroyska loysn.

Virkismøguleikar og trivnaður í Havn

Høgni Djurhuus
Valevni Sambandsfloksins til Býráðsvalið 2000

Grundin fyri at eg havi latið meg stilla upp til býráðsvalið í Havn er, at eg vil vera við til at gera trivnaðin og vinnumøguleikarnar her í býnum enn betur enn teir eru í dag. Fyri at røkka hesum máli, vil eg leggja dent á hesi trí økini:

1. Umstøðurnar hjá vinnuvirkjum skulu betrast.
2. Vit skulu hava góðar skúlaumstøður og góðan skúla.
3. Ferðslan í býnum skal skipast ørvísi.

Vinnuvirkir

Virksemi og arbeiðspláss eru ein fyritreyt fyri at fólk skulu støðast. Tí er neyðugt at betra um umstøðurnar hjá vinnuvirkjum, so at fleiri virki innan framleiðsluøkið koma til Havnar.

Skúlin

Góðar skúlaumstøður eru neyðugar, fyri at tey ungu skulu fáa góðan lærdóm. Henda lærdóm og kunnleika bera tey aftur til samfelagið, tá tey seinni í lívinum, við góðari útbúgving fara til verka.

Ferðslan

Ferðslan í býnum eigur at ganga smidligari og lættari, enn hon ger í dag. Tær longu bíðiraðirnar um morgnarnar og seinnapartarnar eiga at gerast stytri, og eisini skulu tey sum eru til gongu ella á súklu hava minni ampa av bilunum.

Meiri um hesi mál í komandi greinum.